## Eldurin ásettur

Tekniskar kanningar hjá amerikonsku løgregluni vísa, at tann stóri skógareldurin norðan fyri Los Angeles er ásettur. Ein talsmaður fyri løgregluna sigur við blaðið Los Angeles Times, at málið verður nú kannað sum eitt drápsmál, tí skógareldurin hevur kostað tveimum sløkkiliðsmonnum lívið. Herumframt hava fleiri fólk fingið skaða undir sløkkiarbeiðinum, og 64 hús eru farin upp í royk. Myndugleikarnir í Kalifornia siga, at skógareldurin er tann størsti, sum hevur verið við Los Angeles, síðani býurin varð grundlagdur. Næstan 5.000 sløkkiliðsmenn royna at basa eldinum.



## Tangabilar í luftina

Minst 60 fólk lótu lív, tá tveir tangabilar við bensini fóru í luftina har norðuri í Afghanistan. Sjónvarpsstøðin Al-Jazeera sigur frá eygnavitnum, at menn hjá Taliban høvdu tikið teir báðar tangabilarnar og vóru í ferð við at lata fólki bensin, tá bilarnir brádliga fóru í luftina. Løgregluovastin í landspartinum sigur, at tað vóru flogfør hjá NATO, sum bumbaðu tangabilarnar. Ein talsmaður hjá NATO-deildunum vil ikki vátta tíðindini, men hann viðgongur, at NATO-flogfør søktu at Taliban har á leiðini, tá tangabilarnir sprongdust.

## Eik heldur marknaðarføringslógina og fær onga átalu

**Brúkaraumboðsmaðurin hevur kannað galdandi reglur í sambandi við marknaðarføring, tá talan er um bankar. Niðurstøðan í mun til marknaðarátakið hjá Eik Banka herfyri er, at bankin hevur hildið seg til marknaðarføringslógina**

TÍÐINDASKRIV

Seinastu dagarnar hevur Dimmalætting skrivað um, at Eik Banki hevur haft framløgu fyri 8. flokki í Hoyvíkar Skúla. Brúkaraumboðsmaðurin hevur viðgjørt spurningin.

Við tað, at bankar ikki hava nakra áseting um brúkaraverd fyri børn og ung, verður marknaðarføringslógin løgd til grund. Grein 8, stk. 1 er soljóðandi:

§ 8. Marknaðarføring, ið vendir sær til børn og ung, skal taka atlit til natúrliga góðtrúnið hjá børnum og ungum, og teirra vantandi royndir og vantandi evni at meta um ymisk viðurskifti, sum hava við sær, at tey eru løtt at ávirka og ímerkja.

Brúkaraumboðið og Eik eru samd um, at marknaðarføringslógin § 8 stk. 1 er galdandi í sambandi við marknaðarátak móttvegis skúlanæmingum. Sambært danskari rættarsiðvenju á økinum krevst loyvið frá skúlastýrinum, fyri at fremja slík marknaðarátøk. Sambært Eik var samtykkið givið frá skúlans leiðslu.

Við tað, at Eik hevði fingið loyvið frá skúlastjóranum, verður ikki talan um átalu ella brot á grein 8 stk. 1.

Brúkaraumboðið hevur eisini havt málið fyri hjá danska brúkaraumboðsmanninum, við tað at vit í Føroyum ikki hava royndir á slíkum øki. Niðurstøðan er greið, at talan ikki verður um nakra átalu ella brot á marknaðarføringslógina, við tað at Eik tænt føri hevur fingið samtykkið frá skúlastjóranum.

Brúkaraumboðið sannar, at tað er sera óheppið, at sagt verður í blaðskriving í Dimmalætting, at talan verður um átalu, meðan viðgerðin fer fram hjá Brúkaraumboðsmanninum. Fyri rættartrygdina og sakliga viðgerð, er tað av størsta týdningi, at partarnir fáa stundir til hoyringar, áðrenn nøkur niðurstøða um átalu verður framborin.

Í sambandi við fund og samskiftið, hevur Eik sýnt gott samstarv og skjóta og greiða avgreiðslu.

Vegleiðing um marknaðarføring mótvegis børnum og ungum, eisini á skúlum, er at finna hjá danska brúkaraumboðsmanninum, og er tað henda vegleiðing, sum Brúkaraumboðið hevur lagt til grund, við tað at danska og føroyska marknaðarføringslógin eru einsljóðandi.

Marknaðarføringslógin er nýggj, og bæði fyritøkur og stovnar skulu finna sítt stev í mun til lógina.

Omanfyrinevnda vegleiðing um marknaðarføring mótvegis børnum og ungum verður send til hoyringar í næstum til Mentamálaráðið, Vinnuhúsið, Felagið Føroyskir Peningastovnar, og aðrar myndugleikar og stovnar.

### Málið er endað

Vegleiðingin ung og børn er at finna á hesi leinkju: http://www.forbrug.dk/forbrugerombudsmanden/sager-ogretningslinjer/retningslinjer/retningslinjer/brnogunge/

Umframt hesa leinkju er eisini ung og gjaldskort: http://www.forbrug.dk/forbrugerombudsmanden/sager-og-retningslinjer/retningslinjer/bml-retningslinjer/ungeog-betalingskort/

**Brúkaraumboðið**
*Vágur tann 4. september 2009.*

# Í lagi at upplýsa um peningaviðurskifti

**Okkum vantar greiðar reglur fyri samskifti millum skúlar og fyritøkur, heldur Magnus Tausen, formaður Føroya Lærarafelags. Ein banki má ikki fara inn í ein skúla at selja eina vøru, men kunning eftir greiðum reglum er góð, heldur hann**

SKÚLI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag*

Eik Banki breyt ikki marknaðarføringslógina við at hava framløgu fyri 8. flokki í Hoyvíkar skúla.

Tað sigur Brúkaraumboðsmaðurin, sum hevur viðgjørt málið, ið Dimmalætting hevur skrivað um.

Eik Banki gjørdi einki galið, tí bankin hevði frammanundan fingið loyvi frá skúlans leiðslu at koma inn í skúlan við síni kunning.

Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag hevur ikki hug at gera viðmerkingar til ítøkiliga málið, men sum heild kundi hann hugsað sær greiðar reglur fyri slíkt, soleiðis at tað ikki var tann einstaka skulaleiðslan, sum skuldi taka støðu. Reglurnar skuldu komið frá Mentamálaráðnum.

### Reglur mugu gerast

- Vit kundu hugsað okkum betri og skipað samstarv við fyritøkur, sum hava nakað at bjóða í undirvísingini. Vit hava so lítið at halda okkum til. At hatta málið var tikið fram soleiðis var júst dømi um, hvussu lítið avklárað tað samstarvið er, sigur Magnus Tausen.

Hann nevnir, hvussu vanligt tað er í øðrum londum, har fyritøkur eitt nú kunnu lata virðislønir til næmingar, sum hava staðið seg væl.

- Eg veit eisini, at fleiri fyritøkur liggja inni við góðum undirvísingartilfari, til dømis oljufeløgini, peningastovnarnir tað sama, og spell er, at tað ikki verður brúkt, sigur Magnus Tausen, sum tó leggur stóran dent á, at eingin peningastovnur eigur at sleppa inn í ein skúla í skúlatíðini við sølufremjandi tiltøkum.

**SkeiðsDepilin** sd.fo
– So fært tú neyðuga førleikan

**Grundleggjandi leiðaraskeið – GLÚ**

Ert tú júst vorðin tilnevndur deildarleiðari, funktiónsleiðari ella bólkaleiðari í einum ídnaðarvirki, almennum stovni, bólkaleiðari í heimarøktini ella kanska sum fyristøðufólk í einum handli ella líkn. Vilt tú hava størri leiðslufakligt støði, so er grundleggjandi leiðaraskeiðið nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs- og leiðslufunktiónir, kunnu eisini taka hetta skeiðið.

Skeiðið varar í 12 dagar yvir eitt hálvt ár. Byrjað verður 22. september 2009.

Undirvísari er Marin Vang.

**Tilmeldingarfreist:** 10. september 2009 ella so leingi pláss er.
Lesi meira um skeið á www.sd.fo ella ring 318813. Tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.

**SkeiðsDepilin** sd.fo
– So fært tú neyðuga førleikan

**Projektleiðsla avgerandi amboð á nýmótans arbeiðsplássum**

Á flestu stovnum og fyritøkum verða uppgávur í alt størri mun skipaðar sum verkætlanir, og tí er umráðandi, at leiðarar og øll lyklastarvsfólk duga projektleiðslu. Skeiðsdepilin bjóðar nú skeið í grundleggjandi projektleiðslu.

Skeiðið varar 6 dagar yvir 2 mánaðar. Byrjað verður 5. oktober 2009.

Undirvísarar eru Thomas Arabo og Jákup Magnussen

**Tilmeldingarfreist:** 24. september 2009 ella so leingi pláss er.
Lesi meira um skeið á www.sd.fo ella ring 318813. Tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.